LM-099/2023

skifti út frá tí eg havi kunnað lisið mær til í bókum og skjalatilfari og út frá samrøðum við fólk, sum hava skil á hesum viðurskiftum. Tá eg kortini havi tikið mær dirvi til at fara í holt við hesar fyrilestrar, kemst hetta av, at eg seinnu árini havi savnað saman ikki smávegis av tilfari, sum lýsir hesi viðurskifti. Eg haldi meg tora at siga, at stórur partur av hesum tilfari ikki er borin fram til almennan kunnleika áður. Hetta tilfar er virðisleyst, so leingi eg haldi tað fyri meg sjálvan, og sjálvt um eg lati tað til onkran stovn, sum hevur við føroysk landbúnaðarviðurskifti at gera, hevur tað bert ógvuliga avmarkað virði, so leingi tað ikki er handfarið. Tað hevur eisini alla tíðina verið mín hugsan at fara í holt við eina slíka handfaring ella viðgerð, men eg havi verið nakað ivingarsamur um eg tordi at fara undir eina slíka uppgávu, tá eg sum nevnt ikki havi praktiskan kunnleika til føroysk jarðarviðurskifti og búnaðarviðurskifti. Tað frøðir meg tí at fáa høvi til at leggja fram tilfar mítt og tey úrslit eg eri komin til út frá hesum tilfari fyri eini slíkari sakkønari fylking, sum her er samankomin. Eg vóni at fundarfólkið í tí orðaskifti, íð ætlandi skal fara fram aftaná fyrilestrarnar fer at rættleiða meg, tá eg fari skeivur, og at tit fara at gera tykkara til at økja tilfar mítt við dømum frá tykkara dagliga yrki, og at tit eisini koma við nýggjum sjónarmiðum um hesi evni«.

Síðani nevnir Bjørk í innganginum tilfarið, hann hevur savnað. Tað snýr seg um úrdrøg úr øllum yvirlandbúnaðarstevnumálum í tíðarskeiðinum frá 1891 til 1953, øllum rættarmálum tað verið seg borgarlig mál ella revsimál viðvíkjandi landbúnaðarviðurskiftum í tíðarskeiðinum frá 1915 til 1953, dómum viðvíkjandi landbúnaðarviðurskiftum í tíðarskeiðinum frá 1850 til 1915, yvirpolitirættarmálum í tíðarskeiðinum frá 1814 til 1953, grannastevnusamtyktum og politirættarmálum hjá Eysturoyar sýslu í tíðarskeiðinum frá 1900 til 1914, journalmálum viðvíkjandi landbúnaðarviðurskiftum hjá Føroya rætti í tíðarskeiðinum frá 1915 til 1953 og hjá Færø Amt í tíðarskeiðinum frá 1921 til 1936. Harumframt hevur hann bygt á Tingbókina 1615–1654 og prentaði skjøl. Serstakliga hevur hann troytt tað nógva tilfar, íð er prentað í álitinum frá Den Færøske Landbokommission, sum var sett sambært lóg frá 13. mars 1908. Við tað at hetta álit er eitt ógvuliga týdningarmikið verk um føroysk jarðarviðurskifti og búnaðarviðurskifti skal eg gera nakrar viðmerkingar um tað. Í nevndini sótu Chr. Bærentsen, amtmaður, íð var formaður, Rasmus Efersøe, landbúnaðarráðgevari, Johan C. F. Dam, kongsbóndi og løgtingsmaður, Kollafirði, H. C. Larsen, óðalsmaður, Porkeri, D. P. Michelsen, óðalsmaður og løgtingsmaður, Miðvági, Michel Fr. Olsen, festari, Svínoy, Jóannes Patursson, kongsbóndi og løgtingsmaður, Kirkjubø, T. J. Petersen, sýslumaður og løgtingsmaður, Fuglafirði, og J. H. Poulsen, traðarmaður og løgtingsmaður, Skopun. Skrivari hjá nevndini var Chr. Helms, sorinskrivari. Nevndin gjørdi uppskot til nýggja hagalóg, hegnlóg, útskiftingarlóg, grannastevnulóg og landbúnaðarstevnulóg fyri bert at nevna tey týdningarmestu uppskotini. Hesi uppskot blivu seinni hevjað til lógir, stórt sæð í tí líki, nevndin hevði evnað tey til. Álitið frá nevndini kom í 1911 og er rættuliga rúgvusmikið. Umframt lógaruppskotini og viðmerkingarnar til hesi, sum fylla góðar 300 blaðsíður, fevnir álitið um eitt uppískoyti uppá stívliga 800 blaðsíður. Í hesum uppískoyti eru

virðismiklar upplýsingar um føroysk jarðarviðurskifti t.d. Seyðabrævið, ymiskar fyriskipanir um føroysk landbúnaðarviðurskifti upp gjøgnum tíðirnar, brævaskifti millum embætismenninar í Føroyum og donsku stjórnina og viðgerðin av málunum í Føroyum og Keypmannahavn. Høvuðsmenninir at savna hetta tilfar vóru teir báðir Chr. Bærentsen, amtmaður, og Chr. Helms, sorinskrivari, sum báðir eisini hava skrivað áhugaverdar ritgerðir um føroysk landbúnaðarviðurskifti og jarðarviðurskifti í Uppískoytinum. Eisini er har prentað áhugaverd ritgerð av J. A. Lunddahl, íð hevði verið landfúti í Føroyum. Ritgerðin hjá Lunddahl varð fyrstu ferð prentað í 1851. Bjørk byggir eisini á aðrar prentaðar keldur eitt nú Lucas Debes, Tarnovius, Landt og Svabo, og á bókmentir yvirhøvur, sum nema við føroysk landbúnaðarviðurskifti eitt nú bygdasøgurnar. Eisini hevur hann lisið hópin av bókmentum av løgfrøðisligum og øðrum slagi viðvíkjandi viðurskiftunum í øðrum londum, serstakliga Noregi, sum Føroyar løgrættarliga sæð hava staðið nær eisini mong hundrað ár aftaná, at Noreg fekk kong saman við Danmark. Soleiðis varð tað ikki Danska Lóg Chr. Fimta frá 1683, íð varð sett í gildi í Føroyum, men harafturímóti Norska Lóg frá 1687 hjá sama kongi. Partur av Norsku Lóg er framvegis galdandi í Føroyum.

Hetta var so nakað um persónin Bjørk og tað keldutilfar, hann hevur nýtt undir arbeiðinum við Bygdarættinum. Fyrilestrarnir fóru fram gjøgnum 3 vetrar. Veturin 1956/57 var evnið »Húsdjórahald v.m.«,veturin 1957/58 »Ognarviðurskifti og Úskifting« og veturin 1958/59 »Strandrætturin«. Fyrilestrarnir og orðaskifti aftaná vórðu fjølritað og innbundin í bókaverkinum Færøsk Bygderet I-III, sum tilsamans er uppá stívar 1300 blaðsíður í stórum broti umframt registur o.t. Tað tykir mær at vera heppið, at eisini orðaskiftið er fest á blað og fjølritað, tí har eru forvitnisligar upplýsingar frá kønum monnum. Hesar upplýsingar vóru kanska farnar í grøvina við teimum, um tær ikki blivu varðveittir á henda hátt. Tað er sjálvsagt ikki gjørligt í einum fyrilestri at geva bert eina nøkurlunda nágreiniliga frágreiðing um innihald í hesum megnarverki.

Eg havi verið eitt sindur í iva um, hvussu eg skuldi grípa uppgávuna ann. Mær tykir at tað eru tvinnir kostir í at velja. Annar er at geva eitt yvirlit yvir verkið, sum tað er. Hin er at taka einstakan tátt ella einstakar tættir burturúr og viðgera teir. Tann fyrri møguleikin fer óivað at kennast eitt sindur turrisligur, og hin gevur bert eina avmarkaða mynd av heildini. Eg kom at hugsa um eina søgu úr onkrari lesibók frá míni skúlatíð. Søgan handlaði um ein mann, íð var boðin til borðs, og fyri honum varð settur ein fótamørur. Hann ivaðist í, um hann skuldi skera sær ein bita av tí fremsta partinum av fótamørinum ella ein bita av tí aftasta partinum. Hann hevði hug at fáa av báðum hesum pørtum, men mátti ásanna, at »skeri eg teg her, so missi eg teg har«. Hann fann tó uppá ráð. Hann legði fótamørin saman og skar av báðum pørtum í senn. Somu mannagongd kundi eg hugsa mær at nýtt í hesum fyrilestri,men ásannast má, at umrødda verk »Færøsk Bygderet I-III« er ikki hissini fótamørur at fara undir.

Eg skal nú geva eitt stutt yvirlit yvir nøkur av teimum evnum, sum umrødd